Tíðindabræv 12/2013 – Rakstur

4. oktober, 2013

**PSC: - Frásøgn fyri 3. ársfjórðing 2013**
**- Ábendingar frá herda eftirlitinum CIC**

Vísandi tíðindabræv nr. 08/2013 (rakstur) og frásøgn okkara frá fyrsta ársfjórðingi verður við hesum kunnað um dagførdu tølini eftir triðja ársfjórðing fyri føroyska flotan:




Ritmyndin omanfyri gevur ábending, vit áður hava skrivað um, og sum tykist halda á: Talið av kanningum í fremmandum havnum fer ikki niður, men talið av viðmerkingum tykist hækka eitt sindur.

Við omanfyri standandi tølum verður í løtuni føroyski “Excess Factor” (EF) – 0,64. Sum sæst av tíðindabrøvum, ið áður eru send út, endaði okkara EF á -0,73 við árslok 2012.

## Miðvíst kanningarátak – CIC (Concentrated Inspection Campaign)

Víst verður til tíðindabræv nr. 10/2013 og fráboðaða CIC frá PARIS MoU, ið hevur sum endamál at tryggja viðurskifti sambært SOLAS kap. II-1. Hetta merkir, at sjóneykan er sett á framdrátt og hjálpimaskinur.

Pr. 30. september eru viðmerkingar í flotanum við atliti til framdrátt og hjálpimaskinur hesar:

- 13102 Propulsion & Aux. Machinery – Aux. Engine – not as required
- 13101 Propulsion Main Engine – not as required

Spurdir um pkt. 13102, svarar reiðaríið, at høvuðsmaskinan svaraði ikki nøktandi, tá ið tikið varð yvir á brúnni, og var skipið fyri einum minni óhappi, tá ið lagt varð til kei. Veitarin hevur gjørt royndir, men finnur ikki orsøkina til feilin og kann so statt heldur ikki koma við endaligari niðurstøðu. Uppstigan av forritum er gjørd sum rættandi/ bøtandi atgerð.
Pkt. 13101 vísti seg at snúgva seg um eftirlit við útluftningarlúkum (serstakliga í neyðgeneratorrúminum) Mannagongdin fyri hesum er nú dagførd í viðlíkahaldsskipanini.

## Niðurstøða:

- Málið fyri 2013 stendur fast – at flyta okkum uppeftir á Paris MoU hvíta lista.
- Vit minna á, at útgerð, sum undir CIC-kanning, verður funnin, annað hvørt í ólagi ella óvirkin (t.e. *malfunctioning* ella *inoperative*) verður orsøk til, at skipið verður afturhildið. Dømini omanfyri høvdu ikki við sær afturhald, tí umstøðurnar eru lýstar sum “not as required”.
- Tískil heitir FMA á skiparar og maskinmeistarar at hava serligt eftirlit við maskinunum og við allari útgerð í maskinrúminum.